## Tropiskur stormur hóttir suðurstatirnar



Ein tropiskur stormur í Meksikanska flógvanum kann menna seg til eina ódn, ið kann seta kós móti amerikonsku suðustatunum. Teir amerikonsku veðurmenninir siga, at ódnin kann raka Texas og aðrar statir har suðuri í USA. Fyribils hava myndugleikarnir sent ávaringar um ódn í Texas og Louisiana. Veðurmenninir stúra fyri, at ódnin kann elva til vatnflóð fram við strondini.

## Bókin hjá Andy Mitten kom út í dag

Bókin hjá Andy Mitten við 26 grannauppgerðum úr øllum heiminum er næstmest bílagda fótbóltsbókin, ið er komin út í dag. B36-HB er millum grannauppgerðirnar, ið verða umrøddar. Andy Mitten er kendur fyri sínar greinar í fótbóltsblaðnum, FourFourTwo, og í dag er útgávudagur fyri nýggju fótbóltsbókini, ið nevnist »Mad For It – From Blackpool to Barcelona, football's greatest rivalries«. 26 grannauppgerðir verða umrøddar. Millum annað nevnir Andy Mitten grannauppgerðina, hann sá millum B36 og HB á ovara vølli í Gundadali á hásumri í 2006, fyri tað einastu vinaligu grannauppgerðina í øllum heiminum. Eitt predikat, ið kann tæna HB, B36 og øllum Føroyum til stóran Sóma. Www.amazon.co.uk

# Gerhard missir rættindi

**Javnaðartingmaðurin er ikki longur vælkomin í tingbólkinum, men tað er hann sjálvur, sum hevur sett seg uttanfyri, sigur John Johannessen, formaður í tingbólkinum**

JAVNAÐARFLOKKURIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Gerhard Lognberg er nú ein skerdur fuglur í reiðrinum hjá sínum egna flokki.

Tað er greitt eftir at Javnaðarflokkurin á tingi hevur gjørt av at skerja rættindini hjá Gerhard í flokkinum munandi.

John Johannessen, formaður fyri Javnaðarflokkinum á tingi, staðfestir, at Gerhard Lognberg verður ikki tveittur úr tingbólkinum hjá flokkinum í kjalarvørrinum á, at hann tók seg úr samgonguni í farnu viku.

Men hóast hann ikki formliga verður koyrdur úr tingbólkinum, er tað í veruleikanum at kalla bara á pappírinum, at hann framvegis verður limur, tí rættindi hansara verða munandi skerd.

John Johannessen staðfestir, at hereftir verður Gerhard Lognberg ikki longur fullgyldugur limur í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum.

Men hann staðfestir, at tað er Gerhard Lognberg sjálvur, sum hevur sett seg í hesa støðuna.

- Tað gjørdi hann tá ið hann fór úr samgonguni.

Alt hetta merkir, at hóast Gerhard Lognberg framvegis er formligur limur í tingbólkinum hjá flokkinum, sleppur hann ikki at vera við í politiskum viðgerðum í flokkinum.

- Nú Gerhard Lognberg er farin úr samgonguni, er tað ein natturlig avleiðing, at hann heldur ikki longur sleppur at vera við í politiskum viðgerðum í tingbólkinum, sigur John Johannessen.

Hann sigur, at í tingbólkinum verða samgongumál viðgjørd, og tað viðgerðina hevur Gerhard Lognberg onki longur við at gera, tá ið hann er farin úr samgonguni.

- Vit kunnu ikki hava ein mótstøðu-tinglim hjá samgonguni við í viðgerum av samgongumálum, leggur hann afturat.

Hereftir fer Gerhard Lognberg sostatt heldur ikki at fáa fundarboð til fundir hjá tingbólkinum, tá ið politisk mál eru til viðgerðar.

Eru onnur mál til viðgerðar, kann tað koma upp á tal at geva honum fundarboð.

Formaðurin í tingbólkinum sigur, at hereftir verður Gerhard Lognberg heldur ikki framsøgumaður fyri flokkin í nøkrum málum.

Hann sigur, at tað verður helst eisini neyðugt at umskipa nevndirnar hjá Løgtinginum, so at annað javnaðarfólk kann veljast í tær nevndir, har Gerhard Lognberg annars hevur umboðað flokkin.

Men tá ið Gerhard Lognberg bara formliga er limur í tingbólkinum, hví so ikki taka stigið fult út og koyra hann úr.

- Alt hetta er ein støða, sum Gerhard Lognberg sjálvur hevur sett seg í og hann skal eisini sleppa at taka avgerðina sjálvur um at melda seg úr tingbólkinum, sigur John Johannessen.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Gerhardi Lognberg til blaðið í dag.



*Tað er bara á pappírinum, at Gerhard Lognberg framvegis er limur í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum, tí hann hevur mist tey allarflestu av sínum rættindum*

*Savnsmynd*

# Gerhard lognberg ikki tveittur úr Javnaðarflokkinum

**Floksleiðslufundur í Javnaðarflokkinum var fríggjakvøldið, har leiðslan skuldi hittast at viðgera innanhýsis stríðið í flokkinum og tær ákoyringar, ið eru komnar frá Gerhardi Lognberg mótvegis floksformanni, landsstýrisfólkum og tingmanning floksins**

POLITIKKUR

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hetta var niðurstøðan av fundinum, og av hesum at lesa er Gerhard Lognberg ikki tveittur úr flokkinum, sum fleiri væntaðu fór at henda á hesum fundinum. Harafturímóti varð talan um ein heitorðaðan fund, sum endaði við at Gerhard Lognberg rýmdi í skundi til tess at náa seinasta fartin um Skopunarfjørð, og har floksleiðslan staðfestir at hon stendur aftanfyri floksformannin, lands-stýrisfólkini, tingmanningina og politikkin, ið hevur verið førdur seinastu tíðina, og at floksleiðslan hartar Gerhardi fyri tær ákoyringar, ið hava verið.

Niðanfyri er tíðindaskrivið, sum kom frá floksleiðsluni stutt eftir fundin.

Niðurstøða á floksleiðslufundi Javnaðarfloksins 1. august 2008

Floksleiðslan tekur fult og heilt undir við tí vælaarbeiði, ið floksformaðurin, landstýris- og tingfólkini gera sambært grundsjónarmiðum Javnaðarfloksins. Somuleiðis tekur floksleiðslan staðiliga frástøðu frá útsagnunum og atburðinum hjá Gerhardi Lognberg seinastu tíðina, har hann beinleiðis hevur niðurgjørt floksformannin og tingbólkin. Harumframt góðtekur floksleiðslan ikki, at Gerhard Lognberg, við at taka stuðulin aftur til samgonguna, hóttir parlamentarisku støðuna hjá flokkinum og samgonguni. Floksformaðurin tekur beinanvegin stig til at kalla inn til landsfund at viðgerða framtíðar politisku stevnu floksins.